# Fara at byggja hús í hópatal á Kambsdali

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul av ymsum ættum og regn ella vátakavi. Seinnapartin veksur hann vindin til skrið ella storm av norði og kavaælingur. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann minkar vindin til stívt andøvsgul av norði, um kvøldið lot av ymsum ættum. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 0 og 3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og vátakavi ella regn. Hitin millum 0 og 3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin hvassur vindur ella skrið av suðri, týsdagin snarar hann í landnyrðing. Ælingur, mest sum kavi og hitin millum ÷1 og +3 stig.

**Ein ætlan um at byggja 30 hús á Kambsdali er klár. Fyrstu húsini verða bygt so skjótt nakrar umsóknir eru komnar**

ÍBÚÐARBYGGING
*Áki Bertholdsen*

Kambsdalur: Nú er ætlanin at fara undir rættiliga húsabygging í Kambsdali.

Tveir eysturoyingar, Elias Hansen, byggifrøðingur í Norðragøtu og og Svenn Olsen, timburmeistari í Syðrugøtu, eru til reiðar við eini ætlan um at byggja 15 tvíhús á Kambsdali við tilsamans 30 bústaðum.

Teir hava fingið øll loyvi til vega og farið verður í holt við byggingina, so skjótt teir hava selt nóg nógv hús. Øll 15 húsini verða ikki bygd ísenn, tí, hvussu nógv verða bygd, veldst um eftirspurningin. Enn vita teir heldur ikki, hvussu nógv hús skulu bíleggjast, áðrenn teir fara í holt við byggingina, men grundarlag er ikki at byrja, fyrrenn nøkur hús eru bíløgd.



*Soleiðis fara nýggju tvíhúsini at síggja hút. Høgrumegin er sniðið í tveimum hæddum við fullum kjallara undir. Vinstrumegin síggjast húsini í einari hædd við lofti*

### Kappingarførir prísur

Men tað skuldi ikki verið trupult at sloppið av við húsini, tí eftirspurningurin er stórur eftir grundstykkjum har um vegir.

Okkum er upplýst, at Fuglafjarðar Kommuna hevur 40 umsóknir liggjandi um grundstykki.

Og húsini, sum teir báðir ætla sær undir, eru avgjørt kappingarfør í prísi.

Talan er um tvey sløg av húsum. Tað eina slagið er í einari hædd upp á 84 fermetrar og einum lofti upp á 50 fermetrar og bilhúsi. Tey fara at kosta niðanfyri 900.000 krónur. Hitt slagi eru hús í tveimum hæddum, tvs, kjallara og stovuhædd og bilskúri, tey húsini fara at kosta umleið 950.000 krónur, siga stigtakararnir.

Teir báðir halda eisini, at Kambsdalur er væl egnað til bústaðarbygging.

Í Fuglafirði er ikki nógv byggilendi eftir, men á Kambsdali liggur væl fyri. Nú eru eisini gott og tíðugt samband við bussi oman til Fuglafjarðar allan dagin og handilsskúli og studentaskúli eru tætt við

Men teir eru eisini greiðir yvir, at teir hava ávísar fordómar at berjast ímóti.

– Kamsdalur ber orð fyri at verða ógvuliga vindhart pláss. Men tað passar ikki. Tað er gott at búgva á Kamsdali, men niðri á sjálvum vegnum kann vera vindhart viðhvørt.

Elias Hansen sigur, at tað eru heldur ongir vindskaðar hendir í Kambsdali, uttan einaferð í áttatiárunum, tá ið dalurin var eitt stórt byggipláss og nógv leyst tilfar lá og sløgdist. Tað hevði gjørt skaða allastaðni. Hann vísir eisini á, at á studentaskulanum og handilsskúlanum er rættiliga nógv glas og hartil eru rútarnir sera stórir, men har er ikki ein tann einasti rútur brotnaður, síðani skúlarnir vórðu bygdir. So fordómarnir um Kambsdal og vind vóna teir at fáa avlívað.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷21 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | ÷8 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 994 hPa. sunnan fyri Ísland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1012 hPa. á 50N-32V kemur móti Føroyum og dýpist.




Lágtrýstið yvir Føroyum, 984 hPa. fer spakuliga eystureftir og gevur nógvan vind á okkara leiðum fríggjakvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/03 kl. 06⁰⁰– 07/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷0,0°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,1 mm – mált frá 06/03 kl. 06⁰⁰– 07/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 14,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

6. mars: Seinna kvarter
14. mars: Tendring/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. mar | 02.35 | 15.01 | 01.35 | 14.01 | 01.50 | 14.16 | 04.35 | 17.01 | 05.35 | 18.01 | 00.50 | 13.16 | — | 12.16 | 02.50 | 15.16 | 03.50 | 16.16 | 02.20 | 14.46 | 03.35 | 16.01 |
| 9. mar | 03.26 | 15.51 | 02.26 | 14.51 | 02.41 | 15.06 | 05.26 | 17.51 | 06.26 | 18.51 | 01.41 | 14.06 | 00.41 | 13.06 | 03.41 | 16.06 | 04.41 | 17.06 | 03.11 | 15.36 | 04.26 | 16.51 |
| 10. mar | 04.14 | 16.38 | 03.14 | 15.38 | 03.29 | 15.53 | 06.14 | 18.38 | 07.14 | 19.38 | 02.29 | 14.53 | 01.29 | 13.53 | 04.29 | 16.53 | 05.29 | 17.53 | 03.59 | 16.23 | 05.14 | 17.38 |
| 11. mar | 05.00 | 17.23 | 04.00 | 16.23 | 04.15 | 16.38 | 07.00 | 19.23 | 08.00 | 20.23 | 03.15 | 15.38 | 02.15 | 14.38 | 05.15 | 17.38 | 06.15 | 18.38 | 04.45 | 17.08 | 06.00 | 18.23 |

5 707265 100050 >